Dátueftirlitið

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 29. apríl 2022
J.nr: 22/08225-1
Tykkara skriv:
Málsviðgeri: TH/HáB

**Hoyringsskriv viðv. LM-139/2021 Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. (Beinleiðis atgongd til elektroniskar upplýsingar í telduskipanum)**

Í sambandi við, at formansskapurin í Løgtinginum hevur lagt omanfyri nevnda uppskot fyri tingið, hevur Dátueftirlitið hesar viðmerkingar:

Dátueftirlitið fegnast um, at niðurstøðan hjá eftirlitinum viðvíkjandi beinleiðis atgongd verður tikin til eftirtektar. Dátueftirlitið hevur mett um ætlaðu orðingina av nýggja § 21, stk. 3, og hevur ta fatan, at nýggja orðingin er nøktandi heimild hjá almennum stovnum at loyva Landsgrannskoðanini beinleiðis elektroniska atgongd til sínar skipanir og skráir.

Dátueftirlitið hevur tó nakrar viðmerkingar til almennu viðmerkingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Endamálið hjá Dátueftirlitinum er at virka fyri, og hava eftirlit við, at løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum verður hildin, og soleiðis verja rættindini hjá tí einstaka mótvegis fyritøkum, stovnum og myndugleikum. Dátueftirlitið hevur ongan áhuga í at forða øðrum myndugleikum at útinna sínar uppgávur.

Í almennu viðmerkingunum verður ført fram, at Dátueftirlitið leggur seg beinleiðis út í, og forðar grannskoðanini hjá Landsgrannskoðanini. Hetta er ikki rætt.

Tá ein myndugleiki letur víðari upplýsingar til annan myndugleika, er talan um víðarigeving – og harvið viðgerð – sambært dátuverndarlógini. Tað merkir, at heimild krevst.

Dátueftirlitið

Siðvenjan hjá Dátueftirlitinum hevur verið, at tess meira inntrívandi ein viðgerð er fyri tann skrásetta, tess greiðari skal heimildin vera. Tað merkir eisini, at summar viðgerðir eru so mikið inntrívandi at tær fella uttanfyri vanligu heimildirnar í sjálvari dátuverndarlógini, og mugu tískil hava serstaka lógarheimild í aðrari lóg.

Beinleiðis elektronisk atgongd til skipanir hjá øðrum myndugleika verður mett at vera so mikið inntrívandi, at heimild ikki er fyri slíkari viðgerð í dátuverndarlógini.

Ein myndugleiki ið fær - ella letur - slíka atgongd má tí hava greiða lógarheimild. Tá Dátueftirlitið millum annað hevur til uppgávu at meta um heimild er fyri ávísari viðgerð, merkir tað eisini, at Dátueftirlitið má meta um, hvørt serstøk heimild í aðrari lóggávu er nøktandi í mun til ta viðgerð av persónupplýsingum, ið fer fram.

Í málinum um Almannaverkið og Landsgrannskoðanina hevur Dátueftirlitið tikið avgerð um, at tann ásetingin, ið Almannaverkið vísur til sum heimild fyri at geva Landsgrannskoðanini beinleiðis atgongd, ikki er nóg greið. Hinvegin so merkir hetta *ikki*, at Almannaverkið sum heild ikki hevur heimild at lata Landsgrannskoðanini allar tær upplýsingar ið biðið verður um.

Dátueftirlitið hevur í tí sambandi víst á, at ásetingin í § 21 í løgtingslóg um grannskoðan er orðað á áleið sama hátt, sum fleiri aðrar líknandi eftirlitisásetingar, og er tískil einki serstakt fyri Landsgrannskoðanina. Tulkingin hjá Dátueftirlitinum er í samsvari við vanliga løgfrøðiliga fatan av, hvussu slíkar eftirlitisásetingar skulu tulkast. Dátueftirlitið vísir tí aftur, at talan skal vera um eina løgfrøðiliga ivasama ella enn tá skeiva avgerð.

Í viðmerkingunum verður ført fram, at Dátueftirlitið fer inn á eitt málsøki, ið ikki er umfatað av virkseminum hjá eftirlitinum. Hetta er ein misskiljing. Tað er rætt, at Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum ikki eru umfataði av dátuverndarlógini. Men í hesum samanhangi er talan um ein almennan myndugleika, sum *er* umfataður av dátuverndarlógini, og tí *er* undir eftirliti av Dátueftirlitinum. Viðkomandi myndugleiki vísur til áseting í aðrari løgtingslóg sum heimild fyri at víðarigeva upplýsingar við beinleiðis atgongd. Í slíkum føri metir Dátueftirlitið, at tað *er* uppgávan hjá eftirlitinum at meta um, hvørt viðkomandi heimild er nøktandi – óansæð hvør myndugleiki annars varðar av viðkomandi løgtingslóg. Tað er, fyri so vítt, málinum óviðkomandi um talan er um Landsgrannskoðanina ella onkran annan myndugleika. Tað skal vera greið heimild fyri viðgerðini.

**Dátueftirlitið**

Hinvegin hevur Dátueftirlitið ikki eftirlit við Landsgrannskoðanini. Hvørki hvat sjálvari grannskoðanini ella viðgerð av persónupplýsingum annars viðvíkur. Hetta ítøkiliga málið snýr seg *einans* um heimild at geva øðrum myndugleika beinleiðis elektroniska atgongd til alt skjalatilfarið hjá stovninum – og ikki um virksemið hjá Landsgrannskoðanini annars.

Vegna Dátueftirlitið

Tóri Højgaard
*stjóri*

Helga á Borg
*Dáturáðsformaður*